# FAKTA

**Navn:** Kári á Rógvu
**Aldur:** 37 ár
**Familja:** giftur við Jóhonnu á Rógvi. Saman eiga tey tveir synir: Braga og Brestir.

- Kári stillaði upp til fólkatingsvalið í 2007, men varð ikki valdur. Hann var fyrstvaldur fyri Sjálvstýrisflokkin á løgtingsvalinum í 2008 við 572 atkvøðum.
- Hann varð settur sum lektari á Fróðskaparsetri Føroya í september 2008.
- Hann er av hægst útbúnu løgfrøðingunum í Føroyum.
- Cand.jur. frá Københavns Universitet í 1998.
- Master of Laws (LL.M.) frá Aberdeen University í 1999.
- Doktari í lóg (PhD), var liðugur við sína PHD-ritgerð, og varði hana í 2009 við Háskóla Íslands í Íslandi. Ritgerðin hevði heitið 'West Nordic Constitutional Judicial Review.'
- Umframt løgtingsarbeiðið, undirvísir hann á Fróðskaparsetrinum
- Hann var eisini deildarleiðari á Søgu- og samfelagsdeildini frá 1. februar til 1. november í ár



MYND: ÁLVUR HARALDSEN

Kára, at vit mistu tað savnandi Framburðsfelagið, sum fekk fólk vald í 1903 og vann valið í 1905, men syndraðist á valinum í 1906.

– Vit fingu óhepna flokkabýtið, sum hevði við sær, at vit ongantíð fingu reinan frælslyntan framburðsflokk aftur, sigur Kári á Rógvi.

Tjóðveldi hevur ongantíð verið hansara rørsla. Republikk og suverenitetur – fullveldi – eru abstrakt navnorð í hansara hugaheimi, sum ikki siga honum nakað.

– Eg vil, at vit ráða sjálvi. Vilja danir eiga hatta hálvreligiøsa hugtakið, mugu teir gjarna fyri mær. Men teir skulu gjalda fyri tað. Tá høvi býðst, kunnu vit lýsa okkum óheft fyri at fáa mest møguliga altjóða viðurkenning, men enn er landið ikki førleikament til tess, heldur Kári á Rógvi.

Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum er millum hægst útbúnu løgfrøðingarnar í Føroyum. Kári vardi í fjør sína PHD-ritgerð við Háskóla Íslands.

Tað er ofta sagt um løgfrøðina, at hon er turr, keðilig og tung.

Kári á Rógvi tekur ikki reiðiliga undir við tí.

– Justianus er turrur sum mjøl og má sum alt annað skolast niður við øli! So tekur Tonglatummas til. Nei, álvara, turr jura eitt ógvuliga skandinaviskt fyribrigdi. Orsøkin er tann miseydnaða positivisman. Aðrastaðni er lógkunnleiki fakið hjá teimum, sum vilja broyta og betra. Til dømis eru flestu tingfólkini í USA løgkøn, men tey hava tikið aðra útbúgving fyrst, sum ger teirra løgfrøðingar so fjølbroyttar og førar fyri at loysa landsins vandamál og avbjóðingar, sigur Kári á Rógvi, og vísir á stóra áhugan fyri jura á Fróðskaparsetrinum. Jura er viðkomandi fyri meiniga málsviðgeran og borgaran. Um øll kenna lógina, nærkast vit einum veruligum fólkaræði, og ikki minst rættvísi. Og tá er alt annað keðiligt, sigur hann.

## Ikki arrogantur

Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum verður ofta skírdur sum gløggi og arroganti løgfrøðingurin. Sum akademikarin, sum tilvitað tosar niður á onnur.

Skoðsmálini og ákærurnar hegladu oman yvir Kára á Rógvi, tá hann hartaði ein løgfrøðing í umsitingini fyri at hava verið ov óformell, tí løgfrøðingurin byrjaði ein teldupost við at skriva »Hey Kári«. Innihaldið var niðurlátandi boð um, at tingmaðurin kundi ikki orða seg sum hann ætlaði í ávísum tingmáli.

Fleiri hava tikið skemtandi til, at hansara oyru eru bara til pynt, tí hann lurtar bara eftir sær sjálvum, og ongum øðrum.

Per Højgaard, samskiftisráðgevi, heldur, at Kári á Rógvi leitar framvegis eftir sínum stíli, og at tað kann vera ørkymlandi.

Kári á Rógvi kennir seg ikki aftur í atfinningunum, at hann er arrogantur.

– Eg eri ikki arrogantur. Tað er sum við oyrunum. Hini skulu hava okkurt at rópa eftir, tí tey duga ikki at svara mínum lesarabrøvum. Eg eri í grundini ikki annað enn Pál Joensen. Tað eru helst summi, sum rópa eftir honum, at hann er arrogantur ella okkurt annað. Legg til merkis, at vit noyddust báðir av landinum at fáa neyðugu venjingina. Føroyingar virða ikki vinnarar, og vit skilja ikki, at rættir vinnarar eru fremst av øllum sera arbeiðssamir. Ikki hástórir, sigur hann.

> *Vilja danir eiga hatta hálvreligiøsa hugtakið, mugu teir gjarna fyri mær. Men teir skulu gjalda fyri tað*

Kári P. Højgaard og Kári á Rógvi hava mannað tingsessirnar hjá Sjálvstýrisflokkinum í hesum valskeiðnum. Fyrrverandi formaðurin heldur ikki, at maðurin, sum hevur loyst hann av í formansessinum, er arrogantur.

– Hansara útbúgving ger, at hann hevur ein øðrvísi samskiftishátt. Vit hava sjálvsagt havt sera tætt samband í okkara politiska arbeiði seinastu árini, og eg havi ongantíð upplivað hann sum arrogantan, sigur Kári P. Højgaard.

Heri á Rógvi skilir partvís, hví stóribeiggin verður stundum lagdur undir at vera hástórur. Kári kundi verið meira greiður í sínum samskifti, sigur hann.

– Kári hevur savnað sær eina rúgvu av vitan, og hansara fakliga støði er sera høgt. Tað er nátúrligt, at hann er øðrvísi, tá hann er frammi alment. Tað er kanska okkurt, hann skal arbeiða við. Men tað hevur einki við arrogansu at gera. Kári vil, at úrslitini tala sína søk. Hann dugir kanska politiska spælið ov illa í so máta, tí hann hevur ikki áhuga fyri at vera populistiskur og selja seg og sín politiska boðskap fyri ein og hvønn prís, sigur Heri á Rógvi.

## Seyðamaðurin

Gerandisdagurin hjá Kára kann tykjast einstáttaður.

Hann ferðast dagliga millum snurrandi myndatól, mikrofonir, roknskapartøl, hátíðarligar fundir og lógaruppskot.

Tá hann ikki er upptikin av tingarbeiði, stendur hann framman fyri skúlatalvuni við hvítum kriti í hondini og undirvísir á Fróðskaparsetrinum.

Men tá hann er burtur frá dagliga resinum, dámar honum best at fáast við seyð.

Hann hevur verið hagastýrislimur, og tá Zacharias Wang legði frá sær sum formaður í Óðalsfelagnum, var tað við orðunum 'vit skulu nú velja formann – eg haldi, vit velja bara Kára.'

– So var eg brádliga oddviti hjá landsins moldátarum og knæbøndum, sum okkara øvundarmenn taka til. Eg royni altíð at taka við ábyrgd og taka mítt tørn, men eg royni eisini at takka fyri meg rættstundis. Um fólkaræðið skal rigga, so mugu øll taka um endan í stýrum og nevndum í stovnum, feløgum og hjá myndugleikum. Tað krevur samskipan og samstarvsevni at sita í einum stýri. Tú lærir at skilja millum egin áhugamál og og felags gagn, sigur hann.

Kári er ofta stressaður av tí, sum ikki fæst frá hondini. Hann noyðist stundum at minna seg á, at hann er ikki í samgongu, ikki í valbólki við samgonguna og ikki partur av fíggjarlógarsemjuni, tí tey fólkini mugu vera nakað so ómenniskjasliga strongd av tí, sum liggur á láni, heldur hann.

Kári gavst sum formaður í Javnstøðunevndini í 2008. Hann er formaður í Orðabókagrunninum og nevndarformaður í Fasta Gerðarætti.

## Føroyingar dyrka taparan

Tað hevur mestsum verið bíðað eftir, at Kári á Rógvi setti seg í formansessin í Sjálvstýrisflokkinum. Tað var lagt upp til stríðsval, tá Kári P. Højgaard boðaði frá sínum ynski, at ungi og frísinnaði akademikarin skuldi standa á odda fyri flokkinum til næsta løgtingsvali.

Kári á Rógvi veit, hvørja kós Sjálvstýrisflokkurin skal halda. Flokkurin stevnir móti framburði, miðvísum sosialpolitikki, sum hjálpir teimum óhepnu aftur á føtur, sjálvberandi búskapi og upplýstum stýri. Hann heldur, at hini reka bara ørindapolitikk, og tí er Kári skjótur, greiður og hvassorðaður, tá hann verður spurdur, hvat vantar í føroyskum politikki.

– Politikkur! Grikkar kallaðu øll við samfelagsáhuga fyri politikarar, og tey, sum ikki settu seg inn í stjórn landsins, fyri idiotar (egin, sjálvupptikin). Vit krevja ikki av okkara tingfólki, at tey vísa kunnleika til stjórn og dygdir. Vit dyrka heldur taparan og tað lokala umboðið, sum mest at kalla vinnur ein lutaseðil at ferðast og hugna sær fyri í nøkur ár. Minni skil er á, meira hann tvassar, jú betur. Um hann er falleraður fiskaseljari ella rørleggjari, sum hevur koyrt eina kommunu á heysin, so er alt praktfult. Vit elska ein tapara, sum tykist líka so hjálparleysur, sum vit sjálvi høvdu verið, um vit skuldu stýrt.

Flestu tingfólkini bjóða seg ikki fram, tí tey vilja stýra landinum, men at ganga ørindi fyri fólk og sita í teimum nevndum, har ørindi kunnu gangast. Rómverjar tosaðu um cursus honorum, heiðurskósina, at royna at sita stutt í øllum høgum embætum. Tað kann sammetast við at ganga tær ymsu ódnirnar á fjalli. Tað manglar fullkomiliga hjá okkum. Flestu tingfólk fyrireika seg ikki at flyta og átaka sær aðrar sessir, og koma tí ongantíð runt í skipanini. Hygg at løgmanni, sum nær um ongar viðkomandi royndir hevur, og sum aftur og aftur spælir uppá, at »nú er hann ikki...« – álvaratos! Skiparar mugu søkja sær loðs, um teir ikki kenna farvatnið, men um teir hava fingið skiparakjans, so hava teir ábyrgdina, og kunnu ikki sleppa undan henni við at siga, at »nú eri eg ikki navigatørur«. Ert tú á brúnni, so ert tú á brúnni, sigur Kári á Rógvi, sum veit, at hann skal gera skjótt av at vinna flokkin fram, tí allir floksformenn hava sín seinasta søludag.

– Eg livi sjálvur upp á lænta tíð, sigur Kári á Rógvi.